Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



*Býarbókasavnið verður 35 ár 1. apríl 2004. Anna Brimnes er býarbókavørður í Havn*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Býarbókasavnið 35 ár og fingið nýtt búmerki

**1. apríl eru 35 ár liðin síðan Býarbókasavnið læt upp. Í sambandi við føðingardagin hevur bókasavnið fingið nýtt búmerki og útlán av dvd-filmum byrjar eisini tann dagin**

TÍÐINDASKRIV
*Anna Brimnes*

Fyrsta apríl eru 35 ár farin, síðan Býarbókasavnið læt upp. Hetta var í leigaðum hølum í Niels Finsens gøtu 7. Tíðin var komin, at høvuðstaðurin fekk eitt fólkabókasavn, ætlað øllum borgaranum. Ein fólkabókasavnslóg, sum var samtykt í løgtinginum í 1968, er grundstøðið undir øllum fólkabókasøvnum. Hon er dagførd nakrar ferðir síðan tá, seinast í 2001. Endamálið var og er framvegis, at bókasavnið skal vera fyri øll - hugtøk sum upplýsing, kunnleiki og mentanarupplivingar standa í fremstu røð. Til hetta endamálið skulu bøkur, tíðarhóskandi tilfar sum t.d. ljóðbøkur, sjónbond, fløgur og tilfar, sum fevnir um tónleik, vera til taks at læna ella nýta á bókasavninum. Atgongd eigur at vera til teldur og margmiðlar.

Lesistovu og útlán kendu føroyingar frá Landsbókasavninum, tað bókasavnið, sum fólk høvdu brúkt í 140 ár. Tá hugsað verður um bókasøvn fyri øll, er tað ein sjálvfylgja, at Býarbókasavnið, sum er tað størsta fólkabókasavnið í Føroyum, lænir út til fólk, ið búgva uttan fyri Havnina. Tað hevur verið gjørt øll árini. Ein sjálvfylgja er eisini, at eitt fólkabókasavn hevur rúm fyri børnum. Bókasavn fyri børn burturav var ikki á Landsbókasavninum.

## Barnabókasavnið

Tað var nýhugsan seinast í sekstiárunum, at barnabókasavn eigur at hava høli burturav. Ein rættiliga stórur partur av savninum var og er barnabókasavn, og tað hevur øll árini verið væl vitjað. Bøkur eru fyri børn í øllum aldri, og teldur, ætlaðar børnum, eru á barnabókasavninum. Men tíðir broytast. Vegna plásstrot hevur tíverri ikki eydnast at nøkta tørvin, sum í dag verður settur til hóskandi tilfar á barnabókasavninum.

## Ljóðbøkur

Í seinru helvt av sjeytiárunum var sett á stovn eitt savn við ljóðbókum, ætlað teimum, ið ikki fáa lisið vanligar bøkur. Tá vóru bert ljóðbøkur á donskum. Í dag er eitt hampiligt úrval av føroyskum bókum komið afturat bæði fyri vaksin og børn. Tey seinastu árini eru ljóðbøkur komnar bæði á kassettubandi og fløgu, og væntandi er, at ljóðbøkur fara bert at verða givnar út á fløgu í framtíðini, men enn keypa vit flestar bøkur á kassettubandi. Eitt nýtt yvirlit yvir ljóðbøkur, sum eru til láns, kom í 2003, og eitt uppískoyti er komið í 2004. Yvirlit og uppískoyti fáast á bókasavninum.

*Nýggja búmerkið hjá Býarbókasavninum ímyndar eitt fólk. sum lesur í eini bók ella situr við eina teldu*

## Filmar

Nógv hevur verið spurt eftir filmum, men sjónbond hevur bókasavnið ikki. Tað stigið hava vit lopið um, men fara nú at royna við dvd. Eitt lítið úrval fyri vaksin og børn av filmum verður til útláns.

## Tónleikur

Tónleikur og sangur er støðugt í menning her í Havn og í Føroyum yvirhøvur. Spurt hevur verið um møguleikar at útvega høli burturav til tónleik. Tað er kostnaðarmikið og krevur pláss. Eitt tónleikasavn átti at verið í høvuðsstaðnum, men neyðugt er at bíða, til ein nýggjur bygningur verður bygdur til bókasavn og tónleikasavn.

## Byggiætlanir

Tá hølini vórðu leigað her í Niels Finsens gøtu 7, var tað ein fyribilsloysn. Nú 35 ár seinri er bókasavnið enn í hesum fyribilshølunum, tó varð víðkað nakað um plássið fyrst í nítiárunum, tá vit fingu teknisku deild hjá Býráðnum upp í vaksnamannabókasavnið og ein part av 4. hædd til goymslu og skrivstovuhøli.

Ætlanir at byggja nýtt bókasavn hava verið gjørdar nakrar ferðir, men einki úrslit er komið burturúr enn. Ein ætlan var fyri í sjeytiárunum. Ein var aftur í seinru helvt av áttatiárunum, og so var aftur ein ætlan løgd fram síðst í nítiárunum. Men tíverri er einki hent enn.

Tað er ein sannroynd, at bókasavnið liggur væl fyri í miðbýnum, men fólk, sum illa orka trappurnar, og tey rørslutarnaðu hava ongan kjans yvirhøvur at vitja bókasavnið, tí eingin lyfta er.

## Støðan í dag

Tað er óheppið og ótíðarhóskandi, at bókasavnið er óatkomuligt fyri mong. Harafturat er plásstrotið stórt, so torført er at liva upp til endamálsgreinina. Margmiðlar ella tilfar, sum fevnir um tónleik, eru ikki til taks, uttan tað lítla savnið, bókasavnið eigur av nótum og bókum um tónleik. Tá ið tað er sagt, so skal leggjast afturat, at nógv fólk kortini nýta bókasavnið. Tey seinastu árini hava eini 80.000 vitjað bókasavnið, og millum 65.000 og 70.000 bøkur hava verið læntar út um árið. Í útláninum fyri vaksin var í farna árinum mest lænta yrkisbók Koyribókin og mest lænta fagurbók Oddvør Johansen: Tá ið eg havi málað summarhúsið. Á barnabókasavninum var mest lænta smábarnabók Astrid Lindgren: Kennir tú Pippi Langsokk, og mest lænta bók fyri stór børn var Joanne K. Rowling: Harry Potter og eldbikarið.

Bókasavnið er nógv broytt tey 35 árini, tað hevur virkað. Ein kollvelting var at fáa teldur og internet á bókasavnið. Fólk nýta bókasavnið øðrvísi í dag. Tú kanst fara á bókasavnið og nýta teldurnar har, men til ber eisini at sita við hús og fara inn á heimasíðuna, www.byarbok.fo, og útvega sær kunning um, hvørji tilboð bókasavnið hevur, og tú kanst fara til aðrar síður, sum vit halda eru týdningarmiklar, tá ið tað snýr seg um mentan, kunning og upplýsingar.
Slóðbrótandi er sambandið við umheimin um netið. Vit kunnu útvega tilfar, sum vit áður ikki vóru før fyri. Ikki fæst alt tilfar, men tað ber til vitja inn á bókasavnið og spyrja bókavørðin, og til ber at ringja nr. 31 3626 ella skriva teldubræv byarbok@byarbok.fo
Sendir tú vanligt bræv, so send til Býarbókasavnið, boks 358, 110 Tórshavn.

## Føðingardagurin

Í sambandi við føðingardagin hevur bókasavnið fingið nýtt búmerki. Útlán av dvd-filmum byrjar tann dagin.

Barnabókasavnið fer at hava páskaklipp fyri børn upp til skúlaaldur klokkan 10.

Góðgæti verur til børnini, og kaffi og te verur til vaksin.

Um tú hevur bøkur við hús, og tú hevur havt tær longur enn ásettu lánitíð, so ber til tann dagin at lata tær innaftur uttan at gjalda bót. Bókasavnið hevur gjørt av, at hendan reglan verur í gildi fram til páskir.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Sigrid Samuelsen 75 ár

Leygardagin tann 27. mars fylti Sigrid Samuelsen á Brekku í Klaksvík 75 ár. Mong kenna hana betri sum Sigrid á Støðini, har hon hevur starvast í ein mansaldur.

Sigrid er fødd á Viðareiði, Undir Hoygarðinum; hon er dóttir Malenu Elisabeth Joensen, vanliga nevnd Betta, ið var dóttir Jóhonnu og Daniel Johannes Joensen, vanliga nevndur Dáli, við Garð og Søren Sørensen Undir Hoygaðinum, ið var sonur Birthe Mariu úr Innistovu við Garð og Wilhelm Sørensen Undir Hoygarðinum á Heygum.

Systkin hennara vóru Villi Sørensen, ið var lærari í Klaksvík, hann var eisini blaðstjóri á Sosialinum og landsstýrismaður eitt skifti, Dahl ið var fiskimaður og keypmaður og Jógvan, ið var fiskimaður alla sína tíð.

Pápin Sørin, Dahl og Jógvan vóru allir seyðamenn eisini. Eftir á lívi eru bert Solveig, ið er gift í Danmark og Sigrid.

Sigrid gekk í skúla hjá Poul Enok Hansen, ið segðist vera góður lærari, og eftir skúlatíð var hon ofta í handlinum, ið var í kjallaranum uppi í barnaheiminum, tá nýggja Hoygarðinum.

Mamma hennara doyði, tá hon var lítil, men fastir teirra, Sigga Malena, helt hús við teimum.

Sigrid fór ung á telefonstøðina í Havn at arbeiða og var har í nøkur ár, og seinni kemur hon at arbeiða á telefonstøðini í Klaksvík, tað var, meðan Elin í Lávíkunum var fyri-



støðukvinna, og hon arbeiddi har øll árini, meðan Hjørdis Klein, Hjørdis á Støðini, var har, og tá Hjørdis legði frá sær, gjørdist Sigrid fyristøðuleiðari har og til hon fór frá fyri aldur, ein drúgv og trúgv tænasta.

Sigrid giftist í 1955 við Ragnar Samuelsen, Ragnar hjá Suðuroyar Jóhan og Annu Mariu úr Útistovu í Vági í Klaksvík, ið bæði høvdu siglt við gamla Smyrli og funnið hvønn annan har. Ragnar arbeiddi sum sýslufulltrúi í Norðoya sýslu. Hann doyði í 1993.

Sigrid og Ragnar fingu trý børn: Elisabeth, sum býr í Havn, Jóhan og Andras, sum báðir búgva í Klaksvík, og hon eigur fimm ommubørn, 2 í Havn og 3 í Klaksvík.

Sigrid hevur altíð verið hjálpsom, vinsæl og hon eigur góðan vinaskara, og hugnaligt er at koma á gátt hjá henni og børn, ommubørn og onnur flykkjast um hana.

Árstalvan sigur sjútifimm, men tað sært tú ikki á henni, hon er léttlyndisfólk og dugir eisini av starvsroyndum hendinga væl at umgangast fólk, er avbera handafim, og kemur tú inn til hennara, situr hon ofta við onkrum handarbeiði, og so loysir hon hvørja krossgátu, hon fær hendur á.

Hjartaliga tillukku, Sigrid og góðan byr í framtíðini.

**Nøkur vinfólk**

## Dagurin

**31. mars. Balbina**, deyð umleið ár 120. Navnið var við í teimum fyrstu føroysku álmanakkunum, men er síðan lagt burtur. Hon var dóttir rómverska hermannin Kvirinus og bleiv tikin av døgum saman við pápanum.

WWW.SOSIALURIN.FO

# Til minnis um Hedvig Haraldsen

Góða omma.

Tung vóru boðini tann morgunin, mamma ringdi og segði mær, at tú nú fyri seinastu ferð hevði latið eyguni aftur. Hóast eg visti, hvønn veg tað bar, er tað ringt. Ein kann fyrireika seg rættiliga nógv til, at tey nærmastu skulu fara av hesi fold, men tá dagurin so kemur, vil tað altíð vera ringt.

Serliga við tær, góða omma, tú, ið hevur fylt so nógv í okkara familju, serliga hjá okkum ommubørnum. Øll okkara upplivilsir saman og allar tínar frásagnir frá, tá tú var ung.

Tað tykist mær ikki so langt síðan, at tú var her í Sønderborg saman við mammu, pápa og abba. Tað vóru tíðir, og tú hevur altíð verið glað fyri Danmark, tí tú jú hevði búð har í tínum ungu døgum. Tað tíðina farið eg altíð at hava sum eitt gott minni.

Sum eg nú siti her og royni at skriva eina síðstu tøkk til tín fyri alt tað, tú hevur givið mær og lært meg, renna øll minnini úr barndómi mínum fram fyri meg. Eg minnist, hvussu nógv eg elskaði at koma út til tín. Eg minnist, hvussu ringt tað var fyri okkum tríggjar systrar, tá vit fluttu úr Sørvági til Miðvágs, tí vit vildu ikki vera í Miðvági, vildu bara sleppa aftur til Sørvágs. Eg minnist so væl hesa tíðina; hvørja ferð, mamma ikki var í nánd, og vit høvdu møguleikan, tumlaðu vit onkran bil og vóru á veg til Sørvágs aftur. Mamma var ongantíð í iva um, hvar hon skuldi leita, tí vit vóru jú úti hjá tær omma, har vit antin sótu og ótu tínar pannukøkur ella tínar heimabakaðu køkur, sum vit elskaðu.

Eg minnist eisini, at systir mín og eg altíð skuldu út til ommu at fáa pannukøkur, tá vit sum vaksnar komu heim á vitjan úr Danmark. Sum oftast bakaði tú okkum eina køku at hava við niður aftur, tá vit fóru avstað aftur.

Eitt av minnunum, ið stendur klárast fyri mær er, at tú altíð var ein "Dama" við stóra D, tú gekk jú nógv upp í, hvussu tú sá út. Altíð skuldi hárið setast og sminkan síta perfekt, hóast tú bara skuldi oman at keypa. Eg haldi, at øll, sum hava havt gleðina at kenna teg, kunnu vera samd við mær í, at omma altíð sá gott út í sínum fínu kjólum og pelsum, og við síni varrastift, ið hon aldrig kundi vera fyri uttan. Sjálvt nú at enda, tá tú lá bæði sjúk og avkreftað, var tað sera umráðandi fyri teg, at tú fekk hárið rullað upp, og at tú fekk tína varrastift á og ikki at gloyma alt títt gull, ja, ein kann ikki siga annað enn, at tú var ein sonn Dama.

Eg eri glað fyri, at eg náddi at vera heima og vitja í november mánað, ið skuldi verða síðstu ferð, eg sá teg á lívi. Vit fingu nakrar góðar dagar saman, og eg dugdi væl at síggja, at tú var sera avkreftað og helst ikki hevði langa tíð eftir. So tá eg fór heim aftur, var tað við tárum í hjartanum og vit einari ávísar hugsan um, at hetta helst var síðstu ferð, eg sá teg á lívi.

Eg vil enda við einum broti úr einum sangi hjá Klaus Kjellerup, ið eg haldi hevur ein góðan tekst, ið sigur frá, hvussu eg veit, at tú hevur tað nú, tú ert í himmalinum.



*Det var meget imod din vilje*
*alligevel fik døden ram på dig*
*det er værst at være den efterladte*
*når nogen rejser deres vej*
*Og selv om du er væk for altid*
*så vil jeg ikke græde mere*
*jeg vil lade som om du lever*
*og har det godt nok*
*der hvor du er*
*Har du fået dine vinger*
*sidder de nu godt nok ?*
*og kan du flyve rundt i luften*
*med de andre i din flok ?*
*Og jeg ved, at du er optaget*
*i det store englekor*
*og at du synger endnu smukkere*
*end vi har hørt her*
*på vores jord*
*Se de positive sider*
*du har ingen fjender mere*
*for bitterhed og nederlag*
*findes bare ikke dér*
*Er der nogen i himlen*
*der kan elske dig ?*
*ligeså meget som jeg gjorde*
*nogen der får dig til grine ligeså meget*
*som jeg ?*
*Jeg håber bare du har det godt deroppe*
*og at de andre de kan se, hvor dejlig*
*du er*
*håber bare, at du når det*
*alt det, du ikke nåede her*

**Kirstin**